# beiðis



## FAKTA

**Navn:** Peter Aalbæk Jensen
**Aldur:** 52 ár
**Familja:** Giftur við Lise Palm. Tey eiga trý børn.
**Bústaður:** Herfølge
**Starv:** Filmsframleiðari

Stovnaði í 1992 filmsfelagið Zentropa saman við Lars Von Trier.

Í 2001 fekk hann saman við Vibeke Windeløv og Ib Tardini eina serliga Bodil heiðursløn fyri sítt arbeiði fyri danskan film.

Nú víðagitin sum dómari í Talent 2008.

elektroboogie, ein drongur dugdi at spæla panfloytu við hondunum hjá sær, 10 ára gamla Maja syngur guddómliga væl, og so er tað okkara felags vinur Ragnar, sum er ein ordans rockstjørna.

Hvat hevur verið tað ringasta við dómarauppgávuni í Talent?

- Summi halda, at tað má var krevjandi at skula sita har og vraka so nógv fólk í kappingini, men eg havi valt at viðfara øll fólk eins – líkamikið um tað var ein spastiskur dansari, ein lítil genta ella eitt vaksið fólk. Tá øll hesi ymisku fólkini bjóða seg fram í eini slíkari kapping, so skulu tey eisini hava somu viðferð og sama kjans. Og eg havi ikki havt trupulleikar við at verða harður og skula vraka fólk hvørt kvøld.

### Strævnari til arbeiðis

Tríggir dómarar eru í Talent 2008. Umframt Peter Albæk eru eisini Martin Hall og Julie Steincke, og tey hava øll sín egna stíl at meta um framførslurnar á pallinum.

- Fólk halda kanska, at vit eru biðin um at spæla ein ávísan leiklut sum dómarar, men soleiðis er tað als ikki. Eg kann vera akkurát líka súrur og strævin til arbeiðis, sum eg eri í Talent. Eg haldi faktiskt, at eg eri fittari í Talent, enn eg eri til arbeiðis, men í grundini eri eg bara, sum eg eri – eisini í Talent, sigur Peter Aalbæk.

Við hvørt tykist tað, sum tú ert rættiliga vísur í, at tú hevur rætt. Er tað ein dygd at hava?

- Í mínari bransju mást tú við hvørt taka skjótar avgerðir, men so mást tú eisini kunna viðurkenna, at tú tekur onkrar skeivar avgerðir. Og tað havi eg eisini gjørt í Talent. Tað er í lagi at taka skjóta avgerðir og halda teg hava rætt, um tú eisini ert skjótur at viðurkenna tíni mistøk – og tað geri eg.

### Glaður fyri at hitta børn

Dómarar í kappingum sum Talent gerast landskendir, tá teir í fleiri vikur undirhalda ein millióna stórari hyggjarafjøld, men hetta hevur ikki verið tann stóra broytingin fyri Peter Aalbæk.

- Eg havi verið rímiliga kendur í nógv ár, tí eg havi eitt filmsfelag og eri nógv frammi, so eg havi ikki upplivað somu stóru broyting, sum hinir báðir dómararnir hava upplivað. Fyri Julie og Martin hevur tað næstan verið ein kollvelting. Hinvegin haldi eg, at tað er stuttligt at møta børnum úti á gøtuni, og tey hava hug at spyrja meg um okkurt í Talent, sigur Peter Aalbæk.



*– Summi halda, at tað má var krevjandi at skula sita har og vraka so nógv fólk í kappingini, men eg havi valt at viðfara øll fólk eins – líkamikið um tað var ein spastiskur dansari, ein lítil genta ella eitt vaksið fólk.*

*Peter Aalbæk*



*- Eg vóni, at Ragnar í finaluni fer at vísa, hvat hann dugir, tá hann spælir saman við tónleikarum á hanara egna aldri, sigur Peter Aalbæk*

*Mynd: DR*

# Ragnar kann vinna

**– Eg havi verið imponeraður av framførslunum hjá Ragnari, og hann hevur ein møguleika at vinna Talent-kappingina, sigur Peter Aalbæk Jensen**

**RAGNAR**
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**12 ára gamli havnardrongurin Ragnar Finsson er ein av teimum, sum hevur vunnið seg í finaluna í Talent-kappingini, og Peter Aalbæk heldur, at føroyski tónleikarin hevur ein møguleika at vinna Talent í annaðkvøld.**

**- Eg havi verið imponeraður av framførslunum hjá Ragnari. Líka frá fyrstu upptøkuroyndini til framførsluna í hálvfinaluni. Tað er einki at ivast í, at hann er ein ordiligur tónleikur og dugir at spæla gittar. Eingin hevur gittarin hangandi so langt niðri, um viðkomandi ikki dugir væl at spæla, sigur Peter Aabæk skemtandi.**

**- Eg vóni, at Ragnar í finaluni torir at biðja um hjálp frá nøkrum javnaldrum. Í fyrstu sendingunum sang hann einsamallur, men í hálvfinaluni fekk hann hjálp frá tveimum vaksnum tónleikarum. Eg vóni, at hann í finaluni fer at vísa, hvat hann dugir, tá hann spælir saman við tónleikarum á hanara egna aldri.**

**Peter Aalbæk heldur, at finalan er rættiliga opin, og fleiri hava møguleika at vinna.**

**- Ragnar hevur heilt greitt ein góðan møguleika í finaluni, og eg dugi als ikki at gita, hvør fer at vinna. Vit hava átta stór, men ymisk talent í finaluni, og tað er vónleyst at siga, hvør fer at standa eftir sum vinnarin, sigur hann.**

**Talent veður sent á DR1 klokkan 19 fríggjakvøldið. SvF sendir finaluna frá klokkan 19.15.**